# Zola vil ikki til Chelsea

Tað gongur einki serligt hjá Chelsea, og trýst er á venjaran Luiz Felipe Scolari. Fleiri ensk bløð hava seinastu dagarnar róð fram undir, at Scolari kann fáa sekkin, og Gianfranco Zola skal taka við eftir hann. Zola var í fleiri ár ein av best umtóktu spælarunum hjá Chelsea, og nú venur hann West Ham. Zola sjálvur hevur boðað frá, at hann ætlar sær at halda fram í West Ham.



# Noreg er sum Liktinstein

Týskland skal í næstum spæla ímóti Liktinstein og Wales í HM-undankappingini, og teir fyrireika seg til hesar dystir við at spæla ímóti Noregi. Hetta er ikki heilt tilvildarligt, sigur venjarin. - Dysturin ímóti Noregi er ein týðandi roynd fyri okkum. Noreg fer at spæla líka verjukent, sum Liktinstein og Wales spæla, sigur Joachim Løw sambært VG.



*Onkra staðni í trunkanum er Dejan Lacok. Fagnaðurin var sjálvandi ovurstórur, tá hann við avgerandi bjargingini tryggjaði Neistanum fyrsta steypasigurin í 15 ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hetja í átta sekund

**Dejan Lacok nart bara eina ferð við bóltin í mansfinaluni. Men brotskastsbjargingin tryggjaði Neistanum steypasigurin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fagnaðurin var ovurstórur hjá Dejan Lacok leygardagin, tá mansfinalan var av.

Rumenski málverjin hjá Neistanum hevur fyri tað nógva agerað sum stuðul hjá starvsfeløgum sínum, heldur enn at standa sum málverji. Hetta tí Neistin mest sum hvørja ferð hevur ein útlending ov nógv í hópinum, og at ein av hesum tí má sita yvir.

Blagoje Buha hevði tó ikki verið inni, tá Kyndil fekk brotskast í sínum seinasta álopi, og so tók Dejan av.

- Eg segði við Jakob, at eg kundi gott royna. Bæði Ári og Magnus høvdu staðið væl, men teir høvdu ikki tikið nakað brotskast. Og eg havi ofta tikið lutfalsliga nógv brotskøst, so hví ikki.

Í VÍF var bjargingarprosentið hjá tær upp á júst brotskøst sera høgt. Hvat er loyndarmálið, tá ein málverji skal taka brotskast.

- Tað veit eg ikki. Tað snýr seg um at vera konsentreraður, og so um at duga at bíða so leingi sum tilber. Eg haldi ikki, at tað er annað enn tað, segði fegni málverjin, beint áðrenn hann saman við liðfeløgunum skuldi eftir steypinum.

# Tveir gøtumenn til ÍF

**Poul Ennigarð og Hans Pauli Petersen skulu báðir spæla í reyða ÍF-búnanum í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagið var av tí besta, tá ÍF helt ársveitslu leygarkvøldið.

Fleiri nýggjar troyggjur vórðu sýndar fram, og á nummar 6 og 13 eru tvey nýggj nøvn.



*Poul Ennigarð fer saman við Hans Paula Petersen at spæla við ÍF komandi kappingarár*

Poul Ennigarð, sum ikki gjørdi nakað serligt við fótbóltin í fjør, hevur skrivað undir eitt-ára sáttmála við ÍF, sum hann eisini spældi við fyri nøkrum árum síðani.

Og eisini kemur Hans Pauli Petersen við Poul úr Gøtu. Hans Pauli gjørdi heldur ikki tað heilt stóra við fótbóltin í fjør, men nú hevur hann so tikið gaggurnar framaftur, og hann skal soleiðis eisini vera partur av hópinum hjá ÍF.

Eisini er staðfest, at Viggo Johannesen nú aftur verður at síggja hjá liðnum hjá ÍF, so alt í alt tykist talan í ár vera um ein sterkan hóp, sum eisini kann gera um seg móti sterkastu liðunum í deildini.

